Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.01.2020 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir:: | Jóhan Christiansen<br>Brandur Jacobsen<br>Árni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Tollakur Joensen<br>Hans Mourits Foldbo<br>Gudny Langgaard<br>Uni Rasmussen<br>Hanna Jensen |
| Vara limir: | |
| Ikki møtt: | |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 1/20 | 19/00599-1 | Mál 19/00599 Søla av vinnustykkjum við Leitisstein. Tilmæli og málslýsing. | 3 |
| 2/20 | 19/00309-1 | Mál 19/00309 Søla av skúrum við Lugarið í Leirvík. Málslýsing og tilmæli. | 5 |
| 3/20 | 19/00636-2 | Mál 19/00636 Umsókn um stuðul í 2020 - Reysti. Málslýsing og tilmæli. | 7 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 4/20 | 19/00139-29 | Tilmæli - Umsókn um at broyta hædd á staðseting viðv. matr. nr. 199l | 8 |
| 5/20 | 19/00483-12 | Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 339e | 9 |
| 6/20 | 19/00629-6 | Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi til uppíbygging á matr. nr. 278 í LV | 10 |
| 7/20 | 20/00021-2 | Mál 20/00021 Roknskapur 2019 - Bókasøvnini. Málslýsing og tilmæli | 11 |
| 8/20 | 20/00019-2 | Mál 20/00019 umsókn um stuðul í 2020 - Víkingur | 12 |
| 9/20 | 20/00002-8 | Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi til amboðsskúr matr. nr. 35t í SG - framhald av 17/00204 | 13 |
| 10/20 | 20/00008-1 | Tilmæli - Avtøka av bíðilista til grundstykki í Eysturkommunu | 14 |
| | | | |

# 1/20 Mál 19/00599 Søla av vinnustykkjum við Leitisstein. Tilmæli og málslýsing.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 12.11.2019 | 37/19 | 19/00599-1 |
| 2 Vinnunevndin | 09.12.2019 | 38/19 | 19/00599-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 16.12.2019 | 70/19 | 19/00599-1 |
| 4 Býráðið | 19.12.2019 | 90/19 | 19/00599-1 |
| 5 Vinnunevndin | 20.01.2020 | 2/20 | 19/00599-1 |
| 6 Býráðið | 30.01.2020 | 1/20 | 19/00599-1 |

**Málslýsing:**

Eitt vinnustykki er selt við Leitistein í Gøtudali. Hetta stykkið er 3014m$^2$. Sambært plantekningini eru 3 grundøkir eftir við Leitistein, við fylgjandi støddum:

1) 5040m$^2$
2) 2297m$^2$
3) 1331m$^2$

Eysturkommuna hevur í løtuni fleiri umsóknir til vinnustykkir við Leitistein, og søkt verður eftir hægri kvadratmetratali enn tøkt er.

**Ískoyti 15. Januar 2019**
Umsitingin hevur gjørt upplegg um reglur fyri upptøku og viðgerð av umsóknum um vinnustykki. Uppleggið liggur í málinum.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at seta fer á at selja vinnustykkini við Leitistein í Gøtudali. Mælt verður samstundis til, at umsitingin kemur við einum tilmæli um hvussu sølan verður skipað.

**Ískoyti 25. November 2019**
Mælt verður til at selja stykkini sum víst á "Mynd 1 – við Leitistein". Sum liggur í málinum.

Mælt verður til at brúka partar av teimum treytum, ið Eysturkommuna setur borgarum sum keypa vanligt grundstykki í Eysturkommunu, m.a.:
* Innan 1 ár frá tí, at skeytið er undirskrivað, skal byggiarbeiðið verða byrjað, og vinnubygnaður skal verða innilokaður á stykkinum innan 2 ár, frá tí, at skeytið er undirskrivað.
* Hevur keyparin ikki byrjað ella bygt á stykkinum innan freistina, hevur Eysturkommuna til eina og hvørja tíð rætt at krevja stykkið aftur, ímóti at kommunan rindar keyparanum keypspeningin rentufrían aftur

| |
|---|
| **Ískoyti 15. Januar 2019**<br>Mælt verður til at gera  reglur fyri upptøku og viðgerð av umsóknum um vinnustykki sambært upplegginum í málinum. |

**Viðtøka Vinnunevndin 12. november 2019**
Vinnunevndin mælir til at umsitingin arbeiðir víðari við málinum og kemur við einum uppleggi til skipan av vinnustykkinum á komandi fundi.

**Viðtøka Vinnunevndin 09. december 2019**
Vinnuenvndin mælir til at selja vinnustykkini til Stoyp P/F og AP Bussar sbrt mynd 1 í málinum.
Harumframt mælir Vinnunevndin til, at fáa meira konkreta kunning frá teimum fyritøkunum, ið ynskja vinnustykki út ímóti landsvegnum.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 16. december 2019**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini.

**Viðtøka Býráðið 19. december 2019**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini og fíggjarnevndini

**Viðtøka Vinnunevndin 20. januar 2020**
Vinnunevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti til reglugerð um keyp og bygging á vinnuøkjum, við tillaðingum, sum verða klárar til komandi býráðsfund.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Málið tikið av skrá.

## 2/20 Mál 19/00309 Søla av skúrum við Lugarið í Leirvík. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 08.04.2019 | 17/19 | 19/00309-1 |
| 2 Vinnunevndin | 20.01.2020 | 3/20 | 19/00309-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.01.2020 | 5/20 | 19/00309-1 |
| 4 Býráðið | 30.01.2020 | 2/20 | 19/00309-1 |

**Málslýsing:**

Á býráðsfundi 25. Mars 2019 bleiv samtykt, at skúrarnir við Lugarið í Leirvík skulu seljast til hægstbjóðandi við einum minstaprísi á 100.000 kr. Harafturat bleiv samtykt, at tað lægsta av teimum 4 hægstu boðunum, verður søluprísurin fyri allar 4 skúrarnar.

Áðrenn skúrarnir verða bodnir út, metir umsitingin, at tað er umráðandi at ávísar treytir verða settar til eigararnar av skúrunum. Her verður m.a. hugsa um útsjónd á skúrunum og umhvørvið við Lugarið.

Skúrarnir standa á einum leiguøki og kommunan eigur eisini økið beint uttanfyri allar skúrarnar. Tískil hevur kommunan rætt til at krevja, at tað er reint og ruddiligt kring skúrarnar.

Harafturat eru skúrarnir ein partur av Lugarinum, og metir umsitingin tískil, at tað er rímiligt at krevja, at skúrarnir altíð hava sama lit sum Lugarið.

**Ískoyti 17.01.2020**

Skúrarnir blivu settir til sølu áðrenn jól, og freistin var sett til 15. Januar 2020. Inn komu 5 boð upp á skúrarnar.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmæli**

Mælt verður til at at fylgjandi treytir skulu setast til søluna av skúrunum:

- Økið kring skúrin er kommunalt, og skal haldast reint og ruddiligt.
- Klædningurin skal málast skal minst 8. hvørt ár, galdandi frá 2019. Málast skal við sama uppruna liti, og skúrarnir skulu málast samstundis. Eigararnir samskipa og rinda kostnaðin fyri fyri arbeiðið.
- Skúrarnir liggja í einum maritimum umhvørvi og skulu bert brúkast til endamálið.

**Ískoyti 17.01.2020**

Mælt verður til at selja skúrarnar eftir leistinum, sum bleiv samtyktur á býráðsfundi 25. mars 2019.

## Viðtøka Vinnunevndin 08. april 2019

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Vinnunevndin 20. januar 2020**
Vinnunevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at selja skúrarnar eftir leistinum, sum bleiv samtyktur á býráðsfundi 25. Mars 2019.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 28. januar 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndini

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og vinnunevndini.

## 3/20 Mál 19/00636 Umsókn um stuðul í 2020 - Reysti. Málslýsing og tilmæli.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.01.2020 | 4/20 | 19/00636-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.01.2020 | 4/20 | 19/00636-2 |
| 3 Býráðið | 30.01.2020 | 3/20 | 19/00636-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsókn um stuðul frá svimjifelagnum Reysti. Seinastu árini hevur Eysturkommuna játta stuðul 100.000 kr. um árið til Reysta. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 550.000 kr. eru settar av á rakstrarkonto 524 "Stuðul til ítrótt". |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at játta stuðul á 100.000 kr. Stuðulin verður tikin av konto 524 "Stuðul til ítrótt". |

**Viðtøka Mentanarnevndin 20. januar 2020**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at veita stuðul á 100.000 kr.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 28. januar 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini og mentanarnevndini

## 4/20 Tilmæli - Umsókn um at broyta hædd á staðseting viðv. matr. nr. 199l

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 27.01.2020 | 1/20 | 19/00139-29 |
| 2 Býráðið | 30.01.2020 | 4/20 | 19/00139-29 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 199l í Syðrugøtu hevur søkt um at broyta staðsetingina av húsinum. Tey søkja um, at hæddarstaðsetingin verður hækkað upp til ein metur.<br><br>Víst verður til umsókn í málinum.<br><br>Sambært Skjal A, sum er serstaka byggisamtyktin fyri øki, ber ikki til at hækka hæddina á húsinum meir. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir frá at ganga umsóknini á møti. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 27. januar 2020**

Byggi – og býarskipanarnevndin til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**

Málið tikið av skrá

## 5/20 Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi - matr. nr. 339e

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 27.01.2020 | 2/20 | 19/00483-12 |
| 2 Býráðið | 30.01.2020 | 5/20 | 19/00483-12 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 339e í Leirvík hevur sent umsókn um at flyta húsini tættari Víkavegnum enn 2,5 metur.<br><br>Um Umsóknin skal gangast á møti, krevst frávik frá byggilinjuni.<br><br>Sí skriv í málinum 19/00483-11<br>Víst verður til Støðumynd: A-H1-E1-N001 |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at ganga umsókn um frávik á matr. nr. 339e í Leirvík á møti. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 27. januar 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Einmælt samtykt at taka unvir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 6/20 Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi til uppíbygging á matr. nr. 278 í LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 27.01.2020 | 3/20 | 19/00629-6 |
| 2 Býráðið | 30.01.2020 | 6/20 | 19/00629-6 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ánari av matr. nr. 278 í Leirvík hevur søkt um loyvi at byggja uppí kjallarahædd á húsinum.<br><br>Ætlaða uppíbygging kemur at vera 1.74 m frá grannamark á matr. nr. 279, har kravið er 2,5 metrar. Tí má frávik gevast, um umsóknin kann gangast á møti.<br><br>Av tí at tað er meir enn 5 metrar millum húsini, kann byggiloyvi bert gevast, um umsøkjarin ger ein brunavegg ímóti markinum á matr. nr. 279.<br><br>Víst verður til tekningar í málinum.<br><br>Grannahoyring var sent saman við umsóknini, tað fyriliggur í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at ganga umsóknini á møti. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 27. januar 2020**
Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Einmælt samtykt at taka unvir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 7/20 Mál 20/00021 Roknskapur 2019 - Bókasøvnini. Málslýsing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.01.2020 | 1/20 | 20/00021-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.01.2020 | 1/20 | 20/00021-2 |
| 3 Vinnunevndin | | | 20/00021-2 |
| 4 Býráðið | 30.01.2020 | 7/20 | 20/00021-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Roknskapurin fyri bókasavnið skal góðkennast áðrenn 1. februar, soleiðis at søkt kann verða um endurgjald frá Mentamálaráðnum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at góðkenna fyriliggjandi roknskap. |

**Viðtøka Mentanarnevndin 20. januar 2020**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at góðkenna roknskapin.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 28. januar 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Einmælt samtykt at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

## 8/20 Mál 20/00019 umsókn um stuðul í 2020 - Víkingur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.01.2020 | 3/20 | 20/00019-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 28.01.2020 | 2/20 | 20/00019-2 |
| 3 Býráðið | 30.01.2020 | 8/20 | 20/00019-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Ítróttarfelagið Víkingur søkir hervið Eysturkommunu um stuðul í 2020 áljóðandi 400 túsund kr. – somu upphædd sum í 2019. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 550.000 kr. eru settar av á fíggjarætlanini 2020 á konto 524 "Stuðul til Ítrótt". |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at játta stuðul á 400.000 kr. Stuðulin verður tikin av konto 524 "Stuðul til ítrótt". |

**Viðtøka Mentanarnevndin 20. januar 2020**
Mentanarnevndin tekur undir við tilmælinum, og mælir til at veita 400.000 kr til Víking.

Brandur Jacobsen var úti undir viðgerðini.

**Viðtøka Fíggjarnevnd 28. januar 2020**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjarnevndini.

*Brandur Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni*

## 9/20 Tilmæli - Umsókn um byggiloyvi til amboðsskúr matr. nr. 35t í SG - framhald av 17/00204

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 27.01.2020 | 4/20 | 20/00002-8 |
| 2 Býráðið | 30.01.2020 | 9/20 | 20/00002-8 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur móttikið umsókn um byggiloyvi til amboðsskúr á matr. nr. 35 í Syðrugøtu.<br><br>Umsøkjarin hevur í 2017 fingið byggiloyvi, tann umsóknin bleiv viðgjørd eftir gomlu krøvunum, tað loyvi er nú útgingið.<br><br>Onkrar broytingar eru frá fyrru umsókn. Víst verður til umsókn í mál nr. 20/00002 og 17/00204.<br><br>Grannahoyring fyriliggur mál nr. 20/00002. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at ganga umsókn um byggiloyvi til amboðsskúr á matr. nr. 35t í Syðrugøtu á møti. |

**Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 27. januar 2020**

Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini.

**Viðtøka Býráðið 30. januar 2020**

Einmælt samtykt at taka unvir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

*Hjalti Dalheim var úti undir viðgerðini vegna ógegni*

## 10/20 Tilmæli - Avtøka av bíðilista til grundstykki í Eysturkommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 27.01.2020 | 6/20 | 20/00008-1 |
| 2 Býráðið | 30.01.2020 | 10/20 | 20/00008-1 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Grundstykkjalistin krevur nógva orku at umsita. Tí verður skotið upp at avtaka grundstykkjalistan í Eysturkommunu.<br><br>Her er yvirlit av grundstykkjalistanum tann 21 januar 2020.<br><br>21 januar 2020 er tað:<br>- 6, sum standa á bíðilista í Norðragøtu. Har er 2 grundstykkir tøk.<br>- 11 í Syðrugøtu. 7 av teimum hava fingið bjóða grundstykki. Har er 3 grundstykkir tøk.<br>- 8 í Leirvík. Øll hava fingið bjóða grundstykki. Har er 4 grundstykkir tøk.<br>- 0 við Gøtugjógv. Har er 2 grundstykkir tøk.<br>- 4 Undir Gøtueiði. 3 hava fingið bjóða grundstykki. Har er 3 grundstykkir tøk.<br>- 17 til Neystagrund í Norðragøtu. Eingin hevur fingið bjóða grundstykki. Har koma nøkur grundstykkir, tá øll viðurskifti eru komin uppá pláss..<br><br>Av tí at fólk standa á bíðilista í Norðragøtu og útstykkingin ikki er liðug, kann man gera soleiðis, at tey sum standa á bíðilista í Norðragøtu, kunnu vejla eitt grundstykki, tá útstykkingin verður liðug. Síðan verða hini stykkini lýst alment til sølu á heimasíðuni hjá Eysturkommunu.<br><br>Um grundstykkjalistin verður avtikin, verður depositum á 20.000 kr. flutt aftur til fólk, sum standa á bíðilista og kunning verður sent teimum.<br><br>Hetta merkir at tøk grundstykkir framyvir verða lýst alment til sølu á heimasíðuni hjá Eysturkommunu.<br>Mannagongdin verður:<br>- At tøk grundstykkir verða lýst á heimasíðuni við yvirlit og plan av øki.<br>- Allir fyrispurningar um grundstykkir skulu sendast skrivligt til kommununa.<br>- Grundstykki skal gjaldast í seinasta lagi 3 vikur, eftir at fyrispurningur um grundstykki er sendur til kommununa.<br>- Yvirlit og planur av grundstykkjum verða dagført á heimasíðuni, so hvørt eitt grundstykki verður selt ella latið inn aftur. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar fíggjarligar avleiðingar. |

| Tilmæli |
| --- |
| Mælt verður til at tað ikki er møguligt at skriva seg upp til grundstykki eftir 27 jan. 2020, og at avtaka grundstrykkjalistan í Eysturkommunu pr. 1 februar 2020.<br>Mælt verður til at fylgja mannagongd um sølu av grundstykkjum, ið er lýst í málslýsing. |

**<u>Viðtøka Byggi - og býarskipanarnevnd 27. januar 2020</u>**

Byggi – og býarskipanarnevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá umsitingini. Mælt verður eisini til at senda skriv til tey, sum standa á bíðilista, har tað stendur at tey kunnu raðfesta eitt tøkt grundstykki, áðrenn listin verður avtikin.

**<u>Viðtøka Býráðið 30. januar 2020</u>**

Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevdini. Listin við tøkum grundstykkjum verður dagførdur eitt fast tíðspunkt hvønn mánað, harvið fáa allir borgarar kunning um tøk stykkir samstundis.

fundurin lokin kl. 19.00

______________________
Jóhan Christiansen

______________________
Brandur Jacobsen

______________________
Árni Jacobsen

______________________
Hjalti Dalheim

______________________
Tollakur Joensen

______________________
Hans Mourits Foldbo

______________________
Gudny Langgaard

______________________
Hanna Jensen

______________________
Uni Rasmussen